**Fylgiskjal 2** **31. oktober 2024**

**Roðin – økistænastan fyri Runavíkar-, Nes- og Sjóvar kommunu**

**Suðurstova á Eysturoyar ellis – og røktarheimi**

Eysturoyar røktar- og ellisheim (ERE) varð tikið í nýtslu í februar 1984. Heimið er síðani útbygt tvær ferðir, og í dag eru tríggjar deildir við íalt 70 plássum, harav fimm pláss verða nýtt til rehabilitering og umlætting, alt eftir tørvi.

**Deildirnar á ERE eru:**

- **Norðurstova** við 24 búplássum.
- **Miðstova** við 24 búplássum, har av fýra pláss verða nýtt til rehabilitering/umlætting.
- **Suðurstova** við 22 búplássum til fólk við demens, har av eitt pláss verður nýtt til umlætting.

Skrivstovan hjá Roðanum er á Eysturoyar røktar- og ellisheimi. Har er eisini kantina, sum búfólk, avvarðandi og starvsfólk kunnu gera nýtslu av.

Av tilfarinum frá stovninum sást, at umframt at veita heildarrøkt alt døgnið, vóru hesi tilboð/møguleikar á staðnum:

- Fysioterapi
- Ergoterapi
- Frisør
- Fótarøkt
- Tannviðgerð og røkt
- Læknavitjan eftir tørvi
- Guðstænasta/møtir/andakt
- Mentunartiltøk av ymiskum slagi

Heimið var rúmsátt og var bygt fyri tað mesta í einari hædd. Húsið var í høvuðsheitinum deilt upp í búfólkaeindir við fýra plássum í hvørjari, tvær eindir "renna saman" soleiðis, at hesi átta kundu gera nýtslu av egnum sitirúmi og lítlum tekøki.

Búfólkini høvdu egið rúm, sum var uml. 24 $m^2$ til støddar, íroknað lítla gongd v/skápi og eitt baðirúm. Búfólkini høvdu egið innbúgv. Eitt tvírúm (hjúnarrúm) var í Suðurstovu.

Suðurstova, sum hevði 22 búpláss, hevði tríggjar sitistovur við køki. Atgongd var til venjingarhyl, venjingarhøli, tvey skolirúm, trý goymslurúm, vaktarstovu og skrivstovu hjá deildarleiðara.

Sambært yvirlitinum frá stovninum frá juni 2024 arbeiddu 43 fólk á Suðurstovu: ein deildarleiðari, fýra sjúkrarøktarfrøðingar, fimm heilsurøktarar, 15 heilsuhjálparar, 17 ófaklærd og ein lesandi.

## Samanumtøka og tilmæli

Hølini, har Suðurstovan er, vórðu upprunaliga ikki bygt við serligum atliti at fólki við demens. Broytingar eru gjørdar og framvegis verður arbeitt við broytingum eftir tørvi, og stovnurin hevur fyri stuttum fingið sær fakfólk at ráðgeva um innrætting. Við útgangsstøði í hesum er tað samanumtikið fatanin hjá umboðsmanninum, at talan er um ein stovn, ið hevur rímiliga góðar karmar til sítt virksemi. Eisini er tað fatanin hjá umboðsmanninum, at stovnurin hevur ein starvsfólkahóp við neyðugari fakligheit at taka sær av búfólkunum á Suðurstovu. Arbeiðið tykist væl skipað við stórum denti á, at talan er um búfólk, sum hava demens av ymiskum slagi, at halda tey virkin eftir evni, eins og at geva teimum innihaldsríkar dagar. Umboðsmaðurin hevur í hesum sambandi eisini heft seg við, at tey avvarðandi, sum tosaðu við umboðsmannin, søgdu seg verða væl nøgd við tænastuna, ið stovnurin veitur búfólkunum.

Grundað á samrøðuna við leiðsluna á stovninum, samrøðu við tey avvarðandi, skjøl, ið umboðsmaðurin hevur fingið útvegað frá stovninum, hevur umboðsmaðurin soljóðandi viðmerkingar og tilmæli, sum eru skipað í punktum, ið vísa til brot í frágreiðingini:

**Demensskipanin hjá Roðanum:** Sambært kunningartilfarinum frá Roðanum kann búpláss veitast borgarnum frá 67 ára aldri. Leiðslan greiddi frá, at búpláss eisini kann veitast borgarum undir 67 ár, sum hava alzheimers. Umboðsmaðurin mælti til, at Roðin dagførir kunningartilfarið um tænasturnar hjá Roðanum soleiðis, at tað gerst greitt, at tá tað kemur til búpláss, verða borgarar undir 67 ár við alzheimers viðgjørdar á jøvnum føti við tey, sum hava demens og eru eldri enn 67 ár**.**

**Trygd, møguligur harðskapur**: Í sambandi við umrøðu av spurninginum um harðskap á stovninum hevur umboðsmaðurin víst á, at verbalar hóttanir eisini kunnu fatast sum harðskapur, og fyri trygdina og trivnaðin hjá starvsfólkum er neyðugt at hava fokus á slíkar støður og skráseta tær, tá farið verður út um mark.
Umboðsmaðurin mælir til, at starvsfólk eisini fáa læring í at handfara og at steðga verbalum harðskapi.

**Trygd, tvingsil**: Leiðslan hevur upplýst, at á Suðurstovu hava tey havt ein rørsluvarnara/ávaringarskipan frá sumri 2022, og síðani var talið økt spakuliga til seks. Varnararnir vórðu tiknir burtur í mai 2024.

Ávaringarskipanin, sum Suðurstova nýtti, var ikki knýtt beinleiðis at búfólkunum fyri altíð at hava eftirlit við, hvar tey vóru. Varnarin varð settur á veggin í búrúminum og skrásetti rørslu og var bert virkin um náttina fyri at skráseta, um búfólk fór úr songini um náttina.

Eisini hevur Suðurstova í 2 vikur í apríl 2024 havt eitt serligt handtak, sum var sett á hurðina í staðin fyri eitt vanligt handtak, eitt sokallað “kuglegreb”. Hetta gjørdi, at øll á Suðurstovu ikki høvdu førleika at opna hurðina út av deildini.

Í mai 2024 søkti Roðin Føroya Kærustovn um góðkenning til tvingsilsfyriskipanir til seks búfólk, seks ávaringarskipanir og fimm peilingarskipanir. Í juli 2024 fekk Roðin góðkenning frá Føroya Kærustovni til tær fimm umsóknirnar um at nýta peilingarskipan, men bert eina góðkenning til at nýta ávaringarskipan.

Niðurstøðurnar frá Kærustovninum um ikki at loyva ávaringarskipan vórðu grundaðar á, at víst varð ikki á nakran ítøkiligan vanda við støðuni hjá viðkomandi, sum kundi grunda tørvin á ávaringarskipan. Harumframt varð viðmerkt: “..hóast ætlaða inntrivið ikki rúmast innan lógarkarmarnar í tvingsilslógini fyri at nýtslu av ávaringarskipan sambært § 8 í tvingsilslógini, so ávirkar hetta ikki umsorganarskylduna hjá myndugleikanum mótvegis borgaranum. Ein avleiðing má sostatt vera, at myndugleikin røkir umsorganarskylduna mótvegis borgaranum á annan hátt enn at nýta ávaringarskipan, við tí endamálið, at hjálpa .. í óhepnu støðunum, sum ..kemur sær í “.

Umboðsmaðurin ger vart við, at Tvingsilslógin varð sett í gildi 1. januar 2021. Serligar upplatingarskipanir til hurðar og aðrar forðingar, sum eru at meta sum forðing í eginfrælsið, er tvingsilsinntriv, sum krevur góðkenning í mun til einstaka persónin, sum verður forðaður at fara av einum avmarkaðum øki. Rørsluvarnarar, sum eru eitt slag av ávaringarskipan, kunnu eftir galdandi lóg um tvingsil heldur ikki nýtast uttan góðkenning.

Umboðsmaðurin undrast á, at leiðslan/stovnurin ikki hevur ráðført seg meira um, hvat krevst fyri at seta tvingsilsinntriv í verk ella hevur tikið stig til at søkja góðkenning til tey nevndu tvingsilsinntrivini fyrr enn í sambandi við vitjanina frá umboðsmanninum.

Umboðsmaðurin metir tað vera umráðandi at vísa á, at hóast tvingsil í serligum førum kann sýnast at verða neyðugur fyri at veita nøktandi tænastu (røkt, umsorgan v.m.) til búfólk, sum hevur demens, so skal altíð gerast ein ítøkilig meting av støðuni hjá einstaka búfólkinum, og at tvingsil, sambært Tvingsilslógini, krevur góðkenning. Inntrivini eiga at verða rættaði móti einstaka búfólkinum og ikki øllum búfólkunum sum ein samlað eind.
Nú serliga handtakið til Suðurstovu er tikið burtur, og stovnurin hevur søkt og fingið góðkenning av aktuellu tvingsilsfyriskipanunum í mun til einstøku búfólkini, ger umboðsmaðurin ikki meira við støðuna higartil.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður